Fylgiskjal 10

MEGD
Faroe Islands` Union for the Handicapped

Løgmansskrivstovan
Tinganes
100 Tórshavn

Tórshavn 28.01.2019
J. nr.
Viðgjørt J. Christiansen
Tykkara j.nr.0617-08/18

**Hoyringsskriv viðvíkjandi lógaruppskoti til broyting í lovbekendtgørelse om straffeloven (Revsilógin)** kap 14-19. (Brotsverk móti almennum myndugleikum o.a., brotsverk móti almennum friði og skilhaldi, brotsverk í tænastu ella starvi hjá tí almenna o.a., følsk frágreiðing og følsk ákæra, brotsverk viðvíkjandi gjaldsmiðlum og skjalafalsan).

> **MEGD hevur áður havt lógaruppskotið til hoyringar, har § 157 a. er broytt sambært ynski frá MEGD, og nú eisini fevnir um "brek" sambært 266b:**
> **§ 157 a.** Tá ið revsingin fyri brot á hesa løgtingslóg verður ásett, skal tað roknast sum skerpandi umstøður, at brotið er framt við píning.
> *Stk. 2.* Brotið er framt við píning, tá ið tað er framt í føroyskari, danskari, útlendskari ella millumtjóða tænastu ella starvi hjá tí almenna við at gera skaða á annans likam ella heilsu ella við at elva sterka kropsliga ella sálarliga pínslu ella líðing
> 1) orsakað av politisku sannføring hjá viðkomandi, kyn, rasu, húðarliti, tjóðskaparligum ella etniskum uppruna, trúgv, kynsligum samleika ella **breki**.

MEGD var 22.01.2019 til framløgu og ummælisfund á Løgmansskrivstovuni um lógaruppskotið kapitlarnar 14 – 19 í samband við, at í revsilógin er dagførd og føroyskað.
MEGD tekur undir við, at lógin er umsett og tillagað føroysk viðurskifti, og harvið gerst meira viðkomandi.
MEGD tekur undir við, at broytingin í donsku lógini um harðari/longri revsing ikki er tikin við, tí hon ikki er mett viðkomandi fyri føroyska samfelagið í verandi støðu.
§119 MEGD tekur undir við, at persónar í tænastu ella starvi fyri hitt almenna verða vardir móti harðskapi og hóttanum.
Áhugaverdur spurdómur varð reistur á fundinum, at ein eigur at fara at kjakast um, hvørt samfelagsligi ágóðin er størri við at binda um heilan fingur og seta inn við fyribyrging tíðliga, og soleiðis minka um lógarbrot og tørvin á revsing seinni í lívinum.

**MEGD vil til síðst vísa á ST sáttmálan**
**Grein 13, stk 2:** Til tess at tryggja fólki, ið bera brek, at tey fáa brúkt rættarskipanina, skulu limalondini virka fyri, at tey, sum arbeiða í rættarfyrisitingini, harímillum løgregla og fongsulsstarvsfólk, fáa hóskandi uppvenjing í tí.
**Og grein 15, stk 2**: Limalondini skulu taka øll munadygg stig viðvíkjandi løggávu, fyrisiting, rætti og øðrum til tess at forða fyri, at fólk, ið bera brek, verða pínd ella miskunnarleyst, ómenniskjaliga ella niðrandi viðfarin ella revsað (Kelda MEGD: https://megd.fo/st-sattmalin).

Vinaliga fyri MEGD

Jónvør Christiansen, aðalskrivari

Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
The Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo